**Fiskimálaráðið**
Bókbindaragøta 8
P.O. Box 347
FO-110 Tórshavn

*Att.: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður/Rógvi Reinert, aðalstjóri*

Hoyvík 28.12.2012

**Viðv.: Mál: 12/01091: Uppskot til broytingar í lóggávu um Búnaðargrunn v.m.**

Víst verður til omanfyrinevnda mál, har landsstýrsimaðurin í búnaðarmálum, setti eina landbúnaðanevnd við áheitan um, at nevndin sambært "Arbeiðssetningur hjá landbúnaðarnevnd" bað nevndina lýsa ymisk viðurskifti innan landbúnaðin í Føroyum.

Í nevndina vóru vald:

| | |
|---|---|
| Vegna Búnaðargrunnin: | Óluva J, Midjord, formaður í Búnaðagrunninum<br>Poul Hansen, næstformaður í Búnaðagrunninum |
| Vegna Bóndafelagið: | Sigert Patursson, næstformaður |
| Vegna Búnaðarstovuna: | Bjørn Patursson, stjóri á Búnaðarstovuni |
| Vegna MBM: | Hákun Steingrímsson, stjóri á MBM<br>Magnus S. Petersen |

Sambært arbeiðssetninginum skuldi nevndin m.a. koma við uppskoti í stutttíðarhøpi um hvørji tiltøk kundu betra um fíggjarliga avkastið í vinnuni, og í langtíðarhøpi hvørji tiltøk beinleiðis kundu stimbra eina sjálvberandi føroyska landbúnaðarvinnu. Biðið varð um, at:

> Niðurstøðurnar hjá nevndini, og møguligt viðkomandi tilfar, verða fest í eina frágreiðing, ið verður latin landsstýrismanninum í seinasta lagi 1. februar 2013.

Nevndin hevur valt at gera eitt fullfíggja lógaruppskot fyri Búnaðargrunnin og gera nakrar fylgibroytingar í øðrum lógum og kunngerðum t.e. hagalógin, skattalógin og Kunngerð fyri Búnaðarstovuna.

Við leggja nú við fylgjandi:

1. Uppskot til nýggja løgtingslóg um Búnaðargrunn
2. Uppskot til broyting í skattalógini
3. Uppskot til broyting í hagalógini
4. Uppskot til broyting í Kunngerð nr. 99 frá 04. november 2010

Hvør einstakur limur í nevndini tilskilar sær rætt til saman við teimum hann umboðar at koma við hoyringssvari, sum ikki nýtist at vera í fullum samsvari við uppskotið.

Landbúnaðarnevndin metir seg við hesum, at hava liðugtgjørt sítt arbeiði sambært arbeiðssetninginum.

Ynskir Landsstýrismaðurin, at Landbúnaðarnevndin heldur áfram við øðrum arbeiðssetningi, skulu vit siga frá, at nevndin er sinnað til tað.

Vinarliga

| | | |
|---|---|---|
| Óluva J. Midjord | Poul Hansen | Bjørn Patursson |
| Sigert Patursson | Hákun Steingrímsson | Magnus S. Petersen |

Uppskot
til
Løgtingslóg um Búnaðargrunn

## Kapittul I.
## Navn, heimstaður endamál

**§ 1.** Stovnaður verður grunnur, nevndur Búnaðargrunnurin.
Stk. 2. Grunnurin hevur heimstað í Tórshavn.
Stk. 3. Endamál grunnsins er at skapa fortreytir fyri, at Føroyar verða so sjálvbjargnar sum til ber við øllum landbúnaðarvørum.

### Allýsingar

**§ 2.** Í hesari lóg skilst við

a) *Landbúnað:*
   - Velting og nýtsla av lendi til plantudyrkan og avbit;
   - Aling av húsdjórum.
   - Jarðfastar ognir og bygningar til húsdjór.
   - Mjólkar-, slátur-, ullar-, vakstrarhús-, grønmetis-, urtagarðs-, loðdjóra- og flogfenaðvirki.
   - Rakstrargøgn til omanfyrinevndu.
   - Onnur vinnutiltøk og ætlanir landbúnaðinum at gagni.

b) *Húsdjór:* Neyt, seyðir, ross, grísar, geitir, loðdjór og flogfenaður.

c) *Velting:* Velting upp úr nýggjum, vegagerð til veltingina og ábøtur umframt onnur velting.

d) *Uppathaldandi grunnur:* Búnaðargrunninum, sum stovnaður við løgtingslóg nr. 21 frá 17. mai 2004 um búnaðargrunn, við seinni broytingum.

## Kapitul II.

## Fígging av grunninum

**§ 3.** Sum stovnsfæ yvirtekur Búnaðargrunnurin allar ognir hjá uppathaldandi grunni.
Stk. 2. Grunnurin yvirtekur øll rættindi og allar skyldur, sum liggja á uppathaldandi grunni.
Stk. 3. Grunninum eigur sum fæ, allar inntøkur, sum í aðrari løgtingslóg eru markaðar at gjalda til festikonti.

## Kapitul III.

## Fígging úr grunninum

**§ 4.** Búnaðargrunnurin mennir og stimbrar føroyskan landbúnað við studningsláni og lánsveiting, herundir eisini rakstrarláni.

*Grundtreytir fyri studningsláni og láni*

**§ 5.** Veiting av studningsláni og láni er m.a. treytað av, at umsøkjari:

1) rekur ella ætlar at reka vinnuligan landbúnað.
2) er bókhaldsskyldugur sambært løgtingslóg nr. 75 frá 24. oktober 1978 við seinni broytingum.
3) er meirvirðisgjaldsskrásettur sambært løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 við seinni broytingum.
4) er búsitandi í Føroyum.
5) hevur ræði á sínum búgvið.
6) hevur neyðugan verkligan og ástøðiligan førleika til at reka slíkan landbúnað, sum studningslán ella lán verður søkt um.
7) hevur hóskandi eginfígging tøka.
8) veitir hóskandi trygd.

*Studningslán*

**§ 6.** Studningslán er einnýtissstuðul, sum kann veitast til landbúnaðarendamál.
Stk. 2. Studningslán kann veitast við upp til

1) 100 % av samlaðu íløguni til velting.
2) 60 % av samlaðu íløguni til nýskapandi virksemi í landbúnaðinum.
3) 50 % av samlaðu íløguni til endurnýggjandi virksemi í landbúnaðinum.

Stk. 3. Er talan um festara, sum 1. januar 2013 í uppathaldandi grunninum hevði innistandandi á festikonto, ájavnt ella størri enn hámarksupphæddin eftir stk. 2 punkt 3), kann grunnurin veita upp til 60% av samlaðu íløguni til endurnýggjandi virksemi í landbúnaðinum.

**§ 7.** Studningslán, verða veitt kontant og megintreytirnar eru, at tey
1) eru rentu- og avdráttarfrí og
2) verða avskrivað yvir eitt upp til 20 ára skeið.

Stk. 2. Um grunnurin ikki tekur avgerð um annað, fellur studningslán til gjaldingar um tað, sum studningslánið varð veitt til, heilt ella partvíst verður nýtt til annað endamál enn tað varð játtað til.

*Lánsveiting*

**§ 8.** Grunnurin kann veita lán til landbúnaðarendamál.

Stk. 2. Lán kann veitast í tann mun, at studningslán og eginfígging ikki røkka til samlaðu íløguna.

*Rakstrarlán*

**§ 9.** Grunninum kann, har serligur tørvur er, veita rakstrarfígging ella borga mótvegis peningastovni fyri rakstrarfígging hjá umsøkjara, sum rekur landbúnað.

Stk. 2. Hámarkið fyri rakstrafíggingini ella borganini er 10% av samlaðu rakstrarinntøkunum hjá viðkomandi fyri seinasta roknskaparárið.

**§ 10.** Tá landsjørð, latin í festi, verður seld ella ognartikin, og sølupeningurin ella endurgjaldið goldið grunninum jbr. § 3 stk. 3, verður upphæddin í fyrsta lagi nýtt til niðurgjalding av møguligari lániskuld hjá festaranum.

Stk. 2. Fyri jørð, sum longu er seld ella ognartikin, og ágóðin inngoldin uppathaldandi grunninum, er sama galdandi. Restupphæddin er ogn grunnsins.

## Kapittul IV.
## Leiðsla grunnsins

*Leiðsla*

**§ 11.** Leiðsla Búnaðargrunnsins verður fyrisitin av nevnd og stjórn.

Stk. 2. Tað liggur á leiðsluni at tryggja
1) eina fullgóða skipan av virksemi grunnsins.
2) at bókhald og roknskapur er nøktandi.
3) at umsitingin av ognum felagsins fer fram á tryggan hátt.
4) at kapitaltilbúgving grunnsins til hvørja tíð er fullgóð heruppií at nóg mikið av gjaldføri er til at nøkta verandi og komandi skyldur, so hvørt sum tær fella til gjaldingar.

Stk. 3. Tey sum mannað leiðsluna skulu vera myndug og ikki undir verjumáli.

*Nevnd*

**§ 12.** Nevndin stendur fyri yvirskipaðu og strategisku leiðsluni í grunninum.

Stk. 2. Nevndin hevur 5 limir, sum landsstýrismaðurin velur fyri 2 ár í senn. Annaðhvørt ár verða valdir ávikavist 2 og 3 limir.

Stk. 3. Nevndarlimur kann til hvørja tíð taka seg úr nevndini við at boða landsstýrismanninum frá.
Landsstýrismaðurin velur nýggjan lim fyri tíðarskeiðið, sum eftir var hjá liminum ið segði seg frá.

Stk. 4. Nevndin skal hava innlit í landbúnaðarvinnu, búskaparfrøði og løgfrøði.
Stk. 5. Nevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni.
Stk. 6. Nevndin letur gera starvsskipan, sum landsstýrismaðurin skal góðkenna.

**§ 13.** Nevndin skal, umframt at røkja yvirskipaðu og strategisku leiðsluna, ansa eftir, at

1) skipað er neyðug mannagongd fyri váðastýring og innanhýsis eftirliti,
2) stjórin útinnur uppgávur sínar á ein hóskandi hátt og eftir leiðreglum nevndarinnar.

*Viðtøkuføri*

**§ 14.** Nevndin er viðtøkufør, tá meir enn helvtin av limunum er umboðað á fundi. Avgerðir mugu tó ikki takast, uttan at allir limir í tann mun, tað ber til, hava havt møguleika at luttaka í málsviðgerðini.
Stk. 2. Nevndaravgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Stendur á jøvnum er atkvøða formansins avgerandi.

*Stjórn*

**§ 15.** Til at standa fyri *dagligu leiðsluni* setir nevndin ein stjóra. Stjórin má ikki verða nevndarlimur.
Stk. 2. Stjórin skal fylgja teimum reglum og akta tey boð, sum nevndin hevur givið.
Stk. 3. Dagliga leiðslan fevnir ikki um avgerðir, sum eftir viðurskiftum grunnsins eru av serligum slagi ella av stórum týdningi. Slíkar avgerðir kann stjórin bert fremja við serligari heimild frá nevndini uttan so, at bíðast kann ikki eftir avgerð nevndarinnar uttan munandi bága fyri virksemi grunnsins.
Tá so er, skal nevndin skjótast til ber kunnast um avgerðina.

*Umboðanar- og tekningarrættur*

**§ 16.** Stjórin umboðar grunnin úteftir.
Stk. 2. Grunnurin verður bundið av avtalum, sum verða gjørdar vegna grunnin av stjóranum ella av meirilutanum í nevndini.
Stk. 5. Umboðsfulltrú kann einans verða veitt av samlaðu nevndini.Umboðsfulltrúin kann til hvørja tíð afturkallast.

**§ 17.** Hevur onkur, sum hevur tekningarrætt eftir § 14, gjørt avtalu ella latið tilsøgn vegna grunnin, bindur hetta grunnin uttan so, at

1) tey, sum hava tekningarrætt, hava virkað í stríð við heimildaravmarkingar sínar, ið eru ásettar í hesi lóg,
2) avtalan ella tilsøgnin fellur uttan fyri heimildir grunnsins ella
3) tann, sum hevur tekningarrætt, er farin út um heimild sína ella hevur skúgvað til viks áhugamál felagsins á týðandi hátt, og triðimaður visti ella átti at vitað tað.

## Kapitul V.

**§ 18.** Búnaðargrunnurin er sjálvstøðugur grunnur, sum ikki verður tikin við á løgtingsfíggjarlóg og í landsroknskapin.

**§ 19.** Búnaðargrunnurin er ikki fevndur av løgtingslógunum nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyristingina við seinni broytingum og nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg við seinni broytingum.

## Kapittul VI.
## Eftirlit og roknskapur

**§ 20.** Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við grunninum.
Stk. 2. Landsstýrismanninum er heimilað at krevja allar neyðugar upplýsingar og skjøl, ið honum tørvar til tess at útinna eftirlitið.
Stk. 3. Gevur grunnurin ikki kravdu upplýsinganar, kann landsstýrismaðurin, eftir skrivliga ávaring velja nýggja nevnd.

**§ 21.** Roknskaparár grunnsins er álmanakkaárið.
*Stk. 2.* Ársroknskapur grunnsins verður grannskoðaður av løggildum grannskoðara.
Stk. 3. Grannskoðaður ársroknskapur saman við árfrágreiðing og grannskoðanarprotokoll verður latin landsstýrismanninum í seinasta lagi 6 mðr. eftir árslok.

## Kapittul VII.

*Umsiting Búnaðastovan*

**§ 22.** Búnaðargrunnurin rindar á hvørjum ári eina upphædd til landskassan svarandi til kostnaðin av at reka tann part av Búnaðastovuna, sum tekst við umsiting av landsjørð.

## Kapittul VIII.

## Skiftisreglir

*Studningur til føroyskt stráfóður*

**§ 23.** Komandi 6 árini verður studningur veittur til føroyskt stráfóður. Fyrsta útgjald verður goldið fyri stráfóður framleitt í 2012.
Stk. 2. Studningurin er kr. 4.119.896,- árliga og verður umsitin av Búnaðarstovuni eftir reglunum í Ll. nr. 32 frá 06.03.2003 og § 5 í Kunngerð nr. 99 frá 04.11.2010 um stuðul til landbúnaðin.

*Búnaðarstovan og tjóðgarður*

**§ 24.** Innistandandi upphædd tann 01. januar 2013, markað til Royndarstøðina (Búnaðarstovan) í Kollafirði, kr. 5.147.766,- er ogn Landskassans, sum verður nýtt til ábøtur á bygningarnar hjá Búnaðarstovuni í Kollafirði.

**§ 25.** Innistandandi upphædd tann 1. januar 2013, markað til Royndarstøðini í Hoyvík, kr. 30.719.375,- verður nýtt til:

I. *Tjóðgarðin í Koltri:*
Upphæddin kr. 6 mió., verður nýtt til tjóðgarðsætlanina í Koltri. Komandi 3 árini verður goldið kr. 2 mió. árliga til Búnaðarstovuna, at nýta til tjóðgarðsætlanina Koltur. Fyrsta gjald er fyri 2013.

II. *Studning til føroyskt stráfóður.*
Upphæddin kr. 24.719.375,- verður nýtt sambært § 23 sum studningur til føroyskt stráfóður.

## Kapittul IX.
## Gildiskoma

**§ 26.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis sum henda løgtingslóg kemur í gildi fer úr gildi Løgtingslóg nr. 21 frá 17. mai 2004 um búnaðargrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 66 frá 26. mai 2011.

Tórshavn, 21. des.. 2012

## Kap. 1 Almennar viðmerkingar

Søguliga sæð hevur løgtingslógin um Búnaðargrunn, sín uppruna í 1937 tá sonevndu landbúnaðarlógirnar vóru settar í gildi. (Jordbrugets fremme, Haugers styrelse og drift, Hegn og markfred, Benyttelse af Indsøer og vandløb, Grandestævne).

Tá lógin um Jordbrugets Fremme, Lov nr. 174 af 24. maj 1937, var sett í gildi var talan um ein stovn, sum *deils* skuldi umsita landsjørð í festi og *deils* skuldi virkað sum lán- og stuðulsstovnur fyri landbúnaðin.
Við Løgtingslóg nr. 20 og nr. 21 frá 17. mai 2004, fer stovningurin sundur í Búnaðarstovu, sum skal umsita landsjørð í festi v.m og Búnaðargrunn, sum skal taka sær av fíggjarligu viðurskiftunum hjá landbúnaðinum.

Tað var greitt fyri Løgtinginum, at illa stóð til hjá einasta reella vinnuliga landbúnaðinum, nevniliga hjá mjólkarbóndunum og tí skuldi okkurt munagott gerast til tess at mjólkarvinnan skuldi hava lív laga.
Búnaðargrunnurin, sum stór sæð fíggjaði allar mjólkarbøndur, skuldi tí hjálpa neyðstøddu festarunum, við at sanera ein part av skuldini.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið (Løgtingsmál nr. 13/2003) verður ma. sagt soleiðis:

> Skuldin innan landbúnaðin
> “.....
> Harumframt hava trupulleikarnir av fíggjarligu niðurundirkomnu festunum í nógv ár verið eitt haft um beinini hjá fleiri festarum, og er tað alneyðugt, at reglur verða ásettar, sum gera tað møguligt at loysa hesar trupulleikar. Skuld, sum ikki er gjørlig hjá festum at renta og avdraga, eigur ikki í allari framtíð at vera ein forðan fyri víðari menning av festinum.
> ....”

Við Kunngerð nr. 96 frá 22. desember 2004, varð Løgtingslóg nr. 21 frá 17. mai 2004 sett at koma í gildi 31. desember 2004.

Í Áliti í løgtingsmáli nr. 51/2003, sum seinni verður staðfest sum løgtingslóg nr. 21. frá 17.05-2004 um Búnaðargrunn verður m.a. sagt

> “... Nevndin mælir tí til bert at geva lógini gildi í eitt avmarkað tíðarskeið upp á 3 ár. Mett verður, at hetta skuldi verið nóg long tíð til at gingið ígjøgnum eftirstøðurnar á lánum og gjørt neyðugar avtalur um niðurskriving og afturgjalding av skuld, sum ikki er gjørlig hjá festum at renta og avdraga, samstundis sum gjørdar verða avtalur um framtíðar festiviðurskifti í hesum sambandi
> ... “
>
> Tí tekur Løgtingið tað heldur óvanliga stig, at áseta í sjálva lógina t.e. § 18, at lógin fer úr gildi 1. mai 2007.

Henda freist er í tveimum umførum longd.

Løgtingslóg nr. 27 frá 30.04-2007 leingir freistina til 1. mai 2010. (lm.nr. 78/2006).
Løgtingslóg nr. 32 frá 29.04-2010 leingir freistina til 1. mai 2013. (lm. Nr. 176/2009).

Framvegis er ongin sanering farin fram hóast gingin eru knapt 9 ár, síðani Løgtingið samtykti, at mjólkarvinnan skuldi hjálpast við sanering av skuld.

Hví so er kann síggjast í forarbeiðinum til løgtingsmálini nr. 78-2006 og nr.176-2009, men høvuðsorsøkirnar eru í stuttum tvær, nevniliga, at Búnaðargrunnurin ikki hevur verið liðugur við sítt arbeiði og at mannagongdin við at leggja avskrivingarmál fyri Løgtingið er tung og óliðilig.

Teir fíggjarligu trupulleikarnir hjá landbúnaðinum, sum Løgtingið í 2003 ætlaði at loysa, eru ikki loystir.
Tvørturímóti er støðan nú so hættislig, at eingin partur av vinnuliga landbúnaðinum, serliga mjólkarbóndum, er lív laga. Onkrir eru longu farnir á húsagang og fleiri eru á veg. Mjólkarvinnan er tí á gravarbakka.

*Støðan hjá vinnuliga partinum av landbúnaðinum.*
Vinnuligi parturin av føroyska landbúnaðinum, er stórt sæð mjólkarvinnan. Hon hevur sera trong kor at liva undir. Støðan er so hættislig, at stórur vandi er fyri , at øll vinnan fer av knóranum um ikki okkurt munandi verður gjørt mjólkarbóndunum at frama.
Grannskoðaravirkið A & M er júst liðug við umfatandi greining av fíggjarstøðuni hjá mjólkarvinnuni. Grundarlagið er almennu roknskapirnir fyri mjólkabóndum umframt aðrar útvegaðar upplýsingar.
Í niðurstøðuni verður m.a. sagt:

> “...Tað er greitt, at skeiva gongdin viðvíkjandi úrslitunum ikki kann halda fram, og við tað at marginirnar eru smalar og inntøkurnar í hesi vinnuni lágar, má nakað munagott henda skjótt, skulu ikki fleiri av mjólkabóndunum verða noyddir at gevast... “

Víðari verður sagt:

> “... Har meira nágreinilig roknskapartøl hava verið til taks, benda hesi tølini á eina nógv vaksna útreiðslu til fóður. Er hetta ein meira generellur trupulleiki eigur at verða hugt at, um dyrking av meira stráfóðri er ein loysn, og hvussu møguligar skipanir kunnu snikkast til fyri at fremja hetta.... “

Roknskapargreiningin hjá Grannskoðaravirkið A & M, av fíggjarstøðuni hjá bóndum, 2007 til 2011, viðgerð bert mjólkarbøndur. Men sum lýst í niðanfyristandandi tabel, er mjólkarvinnan einasta veruliga vinnuvirksemi, sum er eftir innan landbúnaðin. Her eru sett upp tøl fyri 2011 fyri nakrar av teim búnaðarvørum, sum vit annars hava møguleika at framleiða í Føroyum.(Kelda Hagstova Føroya).

**Innflutningur av nøkrum landbúnaðarvørum í 2011**

| Vøruslag<br>Ár 2011 | Innflutningur<br>Kg | Innflutingur<br>Kr. (CIF) | Eginframl.<br>Kg. |
|---|---|---|---|
| Neytakjøt | 698.693 | 29.093.524 | 78.000 |
| Svínakjøt | 492.028 | 13.983.135 | 0 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Seyðakjøt | 418.452 | 14.092.113 | 956.000 |
| Høsnarungar,dunnur v.m | 513.587 | 11.063.580 | 0 |
| Mjólk, jogurt v.m | 247.033 | 3.204.822 | 7.453.928 |
| Smør | 31.269 | 1.363.274 | 38.000 |
| Ostur | 655.032 | 31.494.637 | 0 |
| Høsnaregg | 509.530 | 8.041.708 | 0 |
| Matareplir | 2.392.130 | 9.694.253 | 600.000 |
| Seteplir | 48.884 | 251.106 | |
| Gularøtur, røtur | 476.391 | 2.686.781 | 0 |
| Stráfóður, FE ikki Kg. *) | 2.080.876 | 6.421.478 | 2.043.833 |
| | | 131.390.409 | |
| *) Fóðureind. Umroknað til kg. | 2.894.125 | | 12.263.000 |

Trongu umstøðurnar hjá mjólkarvinnuni síggjast ikki bert aftur í vánaligu tølunum, men eisini í tí vantandi tilgongd av yngra ættarliðnum. Meðalaldurin á teim 28 mjólkarbóndunum er 50,4 ár. Meðan tað fyrr var vanligt at fleiri føroyskir ungdómar søktu sær landbúnaðarútbúgving í grannalondum okkara, er hetta heilt steðga upp. Lítið hugaligt er at fara uppí slíka vinnu tá inntøkumøguleikar og umstøður annars við gomlum niðurslitnum básfjósum eru so vánaligar.

Allastaðni í grannalondum okkara, er vinnan farin frá aldargomlu básfjósunum og yvir til leysgongufjós við robottøkni til mjólkingar.
Í fleiri londum er ásett, at tað av djóravælferðar atlitum, ikki verður loyvt at hava básfjós. Í Danmark, Noregi og Íslandi hava øll londini sett eitt mark til millum 2015 og 2025.
Eftir hetta skal alt verða leysgongufjós. Einki er ásett av slíkum í Føroyum, men skal vinnuni verða lív laga, er hetta vegurin saman við automatisering. Tað kann so hava ta hepnu avleiðing at draga nýggjar og yngri kreftir til vinnuna.

Sum lýst omanfyri av A & M, grannskoðarafyritøkuni, er stráfóðurkostnaðurin ein tann største hóttanin fyri mjólkarvinnuna. Prísirnir eru munadi hækkaðir seinnu árini. Tí er alneyðugt at gerast sjálvbjargin við føroyskum stráfóðri, herundir eisini, at tað sum verður framleitt fæst til høldar. Sum lýst í tabellini omanfyri innflyta vit líka nógv stráfóður, sum vit framleiða. Hetta er skeiv gongd sum endar við at forkoma vinnuni um ikki vend kemur í.

Gongdin í mjólkarvinnuni hevur, sum í øllum grannalondunum verið at eindirnar verða størri fyri at fáa rationellan rakstur. Í Føroyum sær myndin soleiðis út.

| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Garðar | 69 | 69 | 67 | 57 | 48 | 40 | 40 | 32 | 31 | 30 | 28 |
| Neyt | 1.170 | 1.172 | 1.140 | 1.116 | 1.049 | 939 | 961 | 895 | 953 | 919 | 950 |
| Mjólk (x1.000) | 7.033 | 7.490 | 7.266 | 7.581 | 7.432 | 7.104 | 7.272 | 7.162 | 7.184 | 7.103 | 7.227 |

Skal vinnuni verða lív laga er fremsta treyt at stráfóðurframleiðslan munandi verður økt. Gongdin við at fjósini fækka fer at halda áfram. Nýtslan av tí velta bønum hjá teimum sum gevast fæst illa hendur á. Tørvurin á veltum bøi, hjá teimum ið loksins verða eftir, verður tilsvarandi størri.

Tí má velting raðfestast hægst og fortreytir skapast í grunninum at fíggja veltingina og stuðla føroyskari stráfóðurframleiðslu.

Eftir hesum lógaruppskotið verður *deils* ein bráðfeingis stuðulsskipan sett í verk, sum fevnir um studning til føroyska stráfóðurframleiðslu í eitt avmarka tíðarskeið uppá 6 ár og *deils* ein varandi skipan hareftir stuðul verður veittur til velting.
Stuðulin til slíka virðisskapandi velting verður veittur upp til 100% av faktiska kostnaðinum. Sambært Búnaðarstovuni er, yvir eitt áramál, tørvurin á at velta upp úr nýggjum uml. einar 500 hektarar. Við dagsins prísum, sum er 13-15 kr. m2., kann málið røkkast við at veita útvið einar 10 mió. úr grunninum árliga til velting komandi árini.

Fíggingartørvurin er og verður stórur komandi árini. Samstundis er tað ein veruleiki at fígging treyðugt fæst úr føroyskum peningastovnum til niðurpíndu vinnuna. Tí er neyðugt aftur at heimila grunninum at veita rakstrarlán.

Umframt veltistudningin, krevur umleggingin frá básfjósi til leysgongufjós munandi kapital, sum í stóran mun verður at útvega sum studningslán. Ikki er tað heilt við síðuna av, at rokna við, at tey verandi 28 fjósini yvir eitt tíðarskeið enda niðri á eini 15 leysgongufjósum. Leysgongufjós eru innrættaði í støðd eftir hvussu nógvar mjólkirobottar verða nýttir. Ein robottur verður roknaður at mjólka 60-65 neyt. Tað eru 2 leysgongufjós við robottum í Føroyum í dag. Studningur verður veittur uppá 50% fyri samlaðu útreiðslunar, sum helst vil hava við sær, at grunnurin komandi ári skal gjalda einar 12-13 mió. árliga, um tvey fjós verða bygd um árið.

*Samanbering við grannalond.*

Tá talan er um høvuðsvinnuna í landbúnaðinum, eigur at verða nevnt, at korini hjá føroyskum mjólkarbóndum sammet við korini í grannalondunum, sum vit kappast við, eru púra skeiklandi fyri føroyska framleiðslu.

Í grannalondum okkara eru studningsskipanir, sum føroyska studningsskipanin als ikki kann kappast við.

Landskassin hevur, eftir galdandi lóggávu, ikki møguleikar fyri at veita *lán* til landbúnaðin; bert *studningur* er heimilaður.

Studningur til landbúnaðin er heimilaður í løgtingslóg nr. 32 frá 6. mars 2003 um landbúnaðarstuðul. Við støði í hesari lóg er útgivin Kunngerð nr. 99 frá 04.11.2010 um stuðul til landbúnaðin.

Stuðulin verður umsitin av Búnaðarstovuni.

Verandi stuðulsskipan heimilar at veita studning til: Mjólk, neytakjøt, seyðakjøt, stráfóður, súrhoysbrunnar, velting v.m., djórahald, avloysaraskipan og føroysk húsdjór.

Á hvørjari løgtingsfíggjarlóg hevur so verið avsett samlað upphædd til studning undir konto 5.33.2. Landbúnaðarstudningur. Á seinastu fíggjarløgtingslógunum var játtanin henda:

| Ár | | 2.007 | 2.008 | 2.009 | 2.010 | 2.011 | 2.012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 01. | Mjólk | 7.835 | 7.593 | 7.819 | 7.550 | 6.550 | 6.550 |
| 02. | Neytakjøt | 614 | 609 | 680 | 700 | 500 | 500 |
| 03. | Seyðakjøt | 1.864 | 1.929 | 1.982 | 1.550 | 1.400 | 1.400 |
| 04. | Stráfóður | 1.154 | 1.163 | 1.159 | 1.010 | 960 | 960 |
| 05. | Súrhoysbrunn- | 0 | 0 | 0 | 50 | 0 | 0 |
| 06. | Velting v.m. | 485 | 671 | 294 | 550 | 0 | 0 |
| 07. | Húsdýralógin | 77 | 62 | 71 | 70 | 70 | 70 |
| 08. | Avloysaraskipan | 480 | 481 | 480 | 480 | 480 | 480 |
| 10. | Føroysk húsdjór | 50 | 50 | 75 | 50 | 50 | 50 |
| *Útreiðslujáttan tils.* | | *12.559* | *12.558* | *12.560* | *12.010* | *10.010* | *10.010* |

Umframt nevnda árliga studningin verður eisini árligur óbeinleiðis stuðul veittur til:
Mvg-frítøka hjá MBM við sølu av mjólk til handlarnar, var fyri 2011 uml. 16 mió.
Árligi samlaði studningurin til landbúnaðin, í 2011 var sostatt stívliga 26 mió. kr.

Tá tað um kappinganeytarnar ræður eru tað heilt onnur tøl. Londini veita so torgreiddar studningsskipanir, at ilt er at meta um nógvan fjaldan stuðul. Hinvegin eru almenn tøl, sum ofta verða sett í lutfall til fólkatalið í viðkomandi landi.
Skulu vit røkka einum máli um, at Føroyar í mest møguligan mun, gerast sjálvbjargnar innan tær búnaðarvørur, sum kunnu framleiðast í Føroyum, slepst ikki undan at samanbera okkum við grannalondini, sum kappast við okkum um sølu av búnaðarvørum.
Tað er ikki dulsmál, at tær útlendsku búnaðarvørurnar, verða stuðlaðar í ólukkumát.

Í EU er stuðulin til vinnuliga landbúnaðin størsti parturin av árligu fíggjarætlanini, tó at hann seinnu árini er nakað minkaður. Í Noregi og Íslandi er stuðulin til vinnuliga landbúnaðin eisini sera stórur. Noreg er tað land í heiminum, sum veitir størstan landbúnaðarstuðul. Niðanfyri er yvirlit yvir hvussu ymisk lond stuðla landbúnaðinum.




| Land | Studningur samlað | Studningur mjólk | Fólkatal | Pr. íbúgva |
|---|---|---|---|---|
| Danmark | 7.790.000.000 | | 5.500.000 | 1.416 |
| Noreg | 20.000.000.000 | | 4.985.870 | 4.011 |
| Ísland | 694.155.000 | | 319.575 | 2.172 |
| Føroyar | 26.000.000 | | 48.351 | 538 |

Óneyðugt er at gera fleiri viðmerkingar til hvussu ólíkur studningurin er og hvørja ávirkan hetta hevur á føroyska búskapin herundir ikki minst handilsjavnan.

## Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

Lógaruppskotið:

- hevur ongar fíggjarligu avleiðingarnar fyri land og kommunur.
- hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.
- hevur fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna.
- hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.
- hevur ongar serligar fíggjarligar, umsitingarligar, ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.
- hevur sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.
- er ikki tengt at millumtjóða sáttmálum.

| | Fyri landið/lands myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |

## Kap. 3. Serligar viðmerkingar

**Til § 1**

Talan er um, at heilt nýggj lóg verður gjørd fyri grunnin og gamla lógin samstundis fer úr gildi. Tað er av tekniskum ávum neyðugt at endurstovna grunnin. Hóskandi er yvirskipað at lýsa endamál lógarinnar.

**Til § 2**
Allýsingar.

**Til § 3**
Sum nevnt undir viðmerking til § 1, er av tekniskum grundum neyðugt at endurstovna grunnin og greinin speglar henda veruleika.

**Til § 4**
Eingin viðmerking.

**Til § 5**
*Fyrsta* grundtreytin fyri yvirhøvur at kunna veita studningslán ella lán er, at talan er um vinnuligan landbúnað.
*Næstu* grundtreytirnar, eru ásettar í hesi grein, sum eru galdandi bæði tá tað ræður um studningslán, lán og rakstrarlán og veitingar við heimild í skiftisreglunum t.e. stráfóðurstudningur.
Í flestu førum tá tað ræður um vinnuligt virksemi, er talan um, at viðkomandi deils er bókhaldsskyldugur og deils er mvg-skrásettur.
Hvat viðvíkur verkligum og ástøðiligum førleika er ikki gjørligt neyvari at lýsa krøv í lógini. Ætlandi uppbyggir leiðslan innanhýsisreglur fyri hesum og hevur møguleika fyri at útvega sær meting um førleikakrøv frá Búnaðarstovuni.
*Eginfígging* hjá umsøkjara verður ikki hildið ráðiligt at seta nakað %-tal á hvussu stór slík skal verða. Tað má metast um í hvørjum einstøkum føri og tí er valt at siga hóskandi eginfígging. Eginfíggingin kann eisini verða virði av ognum hjá umsøkjara.
*Trygdin* sum umsøkjari skal veita og grunnurin krevja er eisini upp til leiðsluna at avgerða og eigur tí ikki at verða nærri lýst enn við verandi orðing, at talan skal verða um “hóskandi” trygd.
Tá tað ræður um trygd er støðan tá tað ræður um festijørð serlig, tí festari eigur ikki jørðina og tí kann ikki takast veð í landsjørðini.
Tí eru tað aðrar trygdir, sum kunnu koma uppá tal tá tað ræður um umsøkjarar, sum eru festarar, t.d. festibrøv.
Ansast má eftir, at krøvini til eginfígging og trygd ikki verða so strang, at lán og studningslán ikki verða veitt.
Talan er um ein grunn, sum skal gera tað lættari hjá umsøkjara at fáa lán frá grunninum enn tað er at fáa frá peningastovni og til betri treytir enn peningastovnarnir veita lán.

**Til § 6**

Bæði tá tað ræður um studningslán og lán er skilað til, at studningurin/lánið, “kann” veitast upp til ávísan part av íløguni. Grundtreytirnar skulu verða uppfyltar og leiðslan tekur so støðu til um stuðul skal veitast.
Tá tað ræður um studningslán speglar henda grein raðfestingina av stuðli, tí satsirnir eru ymiskir. *Veltingin*, sum størstur dentur verður lagdur á, er heimilað at stuðla upp til 100% av samlaðu íløguni.
At eggja til *nýhugsan og nýskapan* innan landbúnaðin til tess, at Føroyar skulu gerast meiri sjálvbjargnar er grundin til, at slíkar ætlanir raðfestast so høgt, at stuðul kann veitast upp til 60%.
Tá tað ræður um *endurnýggjandi* virksemi kann stuðulin veitast við upp til 50% soleiðis sum heimild var til í gomlu lógini tá tað ráddi um fígging av festikonto og festipulju.

**Til § 7**
Tá tað um mishald ræður, fellur studningslán til gjaldingar, uttanso at grunnurin tekur aðra avgerð. At studningslán falla til gjaldingar merkir her, at bert tann ikki avskrivaði parturin skal afturgjaldast.

**Til § 8**
Grunnurin setir, útum tær grundtreytir sum eru, treytirnar, sum skulu verða loknar fyri at fáa lán. Eisini her er talan um, at grunnurin “kann” veita lán. Tað merkir, at tað er upp til leiðsluna at gera av um lán yvirhøvur verður veitt og til hvørjar treytir slík lán verða veitt. Hinvegin er ætlanin við lánsveitingini, at treytirnar skulu verða lagaligar bæði tá tað ræður um rentu, avdráttartíð, trygd og treytir annars.
Ætlanin er, at alt tað, sum undanfarna lóg hevði heimild til at veita lán til, kemur undir allýsingina av hvat landbúnaður er.
Undanfarna lóg ásetti, at lán kundi veitast til 1) Keyp av búnaðarjørð, 2) Keyp av fæi og fenaði, 3) Ábøtur, velting og nýdyrking av búnaðarjørð, 4) Keyp, bygging, umvæling og útbygging av bygningum, sum hava týdning fyri landbúnaðarframleiðsluna, harundir maskinhøll og verkstað, seyðahús, fjós, felddýrahús, hoyggjhús, hoyggturkihús og -skipanir, súrhoyggjabrunnar, skýlir, ból og hjallar, 5) Rættir, hegn og gyrðingar, 6) Bygging og yvirtøku av sethúsum á festigarði, 7) Keyp av maskinum og amboðum, 8) Nýskapandi tiltøk og verkætlanir, sum stýrið metir kunnu verða við til at menna vinnumøguleikarnar innan landbúnaðin. Lán til tey í nr.4), 7) og 8) nevndu endamál, kundu veitast til virksemi, sum var tengt at landbúnaðinum, t.d. mjólkarvirki, sláturvirki, ullarvirki, vakstrarhús, grønmetisvirki, urtagarðsvirki og flogfenaðvirki.

**Til § 9**
Í verandi lóg, sum verður avtikin, er ikki heimild til at veita rakstrarlán. Hinvegin hevur hesin møguleiki verið fyrr.
Tørvurin hjá serliga mjólkarvinnuni fyri fígging røkkur útum stuðulskipan og vanlig lagalig lán og tá tað í dag er sera torført at útvega sær rakstrarfígging aðrastaðir, er neyðugt at kunna veita rakstrarlán har serligur tørvur er.

Tað er ikki gjørligt at reka vinnuligt virksemi í størri mun uttan rakstrarfígging og uppaftur verri hjá landbúnaðinum, sum hevur so vánalig kor.
Eisini í hesum førinum skulu grundtreytirnar sjálvandi verða uppfyltar. Talan er somuleiðis um at grunnurin "kann" veita rakstrarlán; hann "skal" ikki og tað er leiðslan, sum einsamøll tekur avgerðina.

**Til § 10**
Síðani festibræv eru vorðin "umsetilig", hevur festarin óskerdan rætt til sølupeningin tá festibrævið verður selt. Søluvirði á festibrævinum, er nær tengt at møguleikunum at gagnnýtað festi. Tá hesir møguleikar verða skerdir, tí jørðin verður seld, minkar søluvirðið tilsvarandi.
Festarar seta seg í stóra skuld fyri íløgur á festinum. Tí má henda skuld niðurgjaldast fyrst tá landsjørð í festi verður seld/ognartikin áðrenn restupphæddin fer inn sum fæ hjá grunninum.
Sama er galdandi fyri gamla skuld.

**Til § 11**
Reglan er felags fyri nevnd og stjórn og er við fyrimynd í partafelagslógini, men her gjørt í einari felagsgrein og ikki endurtikið, sum í partafelagslógini, fyri nevnd og stjórn hvør sær. Leiðsla grunnsins hevur ábyrgd av øllum viðurskiftum grunnsins og tekur allar neyðugar avgerðir tað verið seg um at seta treytir fyri veiting av studningslánum, lánum v.m, herundir hvørji førleikakrøv skulu setast til umsøkjarar, hvat hóskandi eginfígging er og hvat ein hóskandi trygd er fyri sudningsláni, láni v.m.
Leiðslan tekur somuleiðis einsamøll allar avgerðir um hvørjar treytir verða settar til lánsveitingarnar, herundir avdráttartíðir, rentusatsir og treytir annars. Eisini tá tað ræður um avgerðir at veita gjaldsskáðar, akkordskipanir og avskrivingr ímóti tapi eins og leiðslurnar í øðrum bankum, fíggingarfeløgum v.m..
Í undanfarnu lóg var ein sera tung og óliðilig skipan fyri avskrivingar av lánum, sum m.a. kravdi, at Løgtingið skuldi góðkenna saneringsumfør. Tað hevur helst verið ein medvirkandi orsøk til, at ongar avskrivingar eru gjørdar í so mong ár og elvt til at støðan í vinnuni er so vánalig sum hon er.

**Til § 12.**
Innihaldið í fyrsta parti av greinini er tikin úr partafelagslógini, sum verður hildin hóskandi at nýta sum fyrimynd her.
Somuleiðis er við regluni um *starvsskipan*, sum nevndin skal gera. Í §§ 130-132 í partafelagslógini er ásetingar um starvsskipan, gegni og tagnarskyldu, sum hildnar verða hóskandi at nýta fyri nevndina við tillagingum.
Ein starvsskipan eigur at fevna um m.a. reglur um gegni, arbeiðsbýti, eftirlit við dagligu leiðsluni, førslu av bókum og gerðabókum, tagnarskyldu, roknskapareftirlit, edv. og trygd.
Hvat viðvíkur *gegni* eigur starvsskipanin at hava áseting um, at limir í leiðsluni ikki kunnu luttaka í viðgerðini av málum um avtalur millum grunnin og viðkomandi sjálvan ella um rættarmál móti viðkomandi sjálvum ella um avtalu millum grunnin og triðjamann ella um rættarmál móti

triðjamanni, um viðkomandi sjálvur hevur ein týðandi áhuga, sum kann stríða ímóti áhugamálum grunnsins, jbr. § 131 í partafelagslógini.
Hvat viðvíkur *tagnarskylduni* eigur starvsskipanin at hava áseting um at stjóri og nevndarlimir ikki ógrunda mugu lata víðari tað, sum tey í arbeiði sínum hava fingið kunnleika til jbr. § 132 í partafelagslógini.

Hildið verður hóskandi, at Landstýrismaðurin skal góðkenna starvsskipanina.

**Til § 13**
Eisini henda regla hevur sína fyrimynd í partafelagslógini, sum í § 116 hevur ásetingar um tað sum liggur á nevndini. Reglan er lagað til grunnin.

**Til § 14**
Reglan um viðtøkuføri hevur sína fyrimynd í § 124 í partafelagslógini, sum verður hildin hóskandi at nýta her og er so lagað til grunnin.

**Til § 15**
Reglan um dagligu leiðsluna hevur sína fyrimynd í § 117 í partafelagslógini, sum verður hildin vælegnað at nýta um stjórnina í grunninum.

**Til § 16**
Neyðugt er at hava reglur um umboðanar- og tekningarrætt fyri grunnin og reglan hevur sína fyrimynd í § 135 í partafelagslógini.

.

**Til § 17**.
Reglan hevur sína fyrimynd í § 136 í partafelagslógini og er lagað til grunnin eftir nøkunlunda sama leisti

**Til § 18**
Ongin viðmerking.

**Til § 19**
Búnaðargrunninum er ikki fevndir av lógunum um alment innlit og fyrisitingarlógini, og kunnu avgerðir grunsins t.d. ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika. Búnaðargrunnurin tekur sær av lánum, studningum v.m og virkar sum ein fíggingarstovnur. Upplýsingar um slík viðurskifti eru ikki egnaði til alment innlit v.m.

**Til § 20**
Stk. 3 er sett inn sum nýtt stykki til tess at tryggja at landsstýrismaðurin kann fremja neyðuga eftirlitið.

**Til § 21**
Ongin viðmerking.

**Til § 22.**
Greinin er ein endurtøka av ásetingunum í verandi lóg.

**Til § 23.**
Sum nevnt undir almennu viðmerkingunum er ein av høvuðsorsøkunum til stóru trupulleikarnar, at stráfóðurkostnaðurin er sera nógv hækkaður. Ov lítið sjálvbjargni er tá tað ræður um egna stráfóðurframleiðslu.
Nýggja reglan er ætlað at skunda undir føroyska stráfóðurframleiðslu. Her er talan um eina bjargingarætlan, sum skal forða fyri at mjólkarvinnan fer fyri bakka. Tó er eitt tíðarmark sett uppá 6 ár, svarandi nøkunlunda til eitt tíðarskeið har roknað verður við munandi velting.
Peningurin verður tikin av innistandandi á festikonto hjá Royndarstøðini í Hoyvík í uppathaldandi grunninum, sí annars § 25.
Sum er umsitur Búnaðarstovan í dag longu stráfóðurstuðul – sum á seinastu fíggjarlóg var kr. 960 tús - sbr. Ll. nr. 32 frá 6. mars 2003 og hildið verður, at Búnaðarstovan soleiðis lætt og uttan meirkostnað kann átaka sær umsitingina av hesum bráfeingisstuðli eisini.

**Til § 24.**
Løgtingið hevur áður viðgjørt spurningin um festikonto hjá Royndarstøðini í Kollafirði. Tá segði ein samd vinnunevnd í sínum áliti í løgtingsmálinum nr. 152/2010 (Ll. nr. 66 frá 26. mai 2011) soleiðis:

> Bæði bygningar og ognin annars hjá Royndarstøðini (Búnaðarstovuni) í Kollafirði treingja til umfatandi umvælingar. Nevndin heldur, at tær 4,2 mió. kr. á hesi festikontuni mugu vera tøkar til hesar ábøtur og fara tískil ikki í felags festipuljuna.

Her verður Løgtingsins vilji staðfestur í lógini og heimildin til nýtslu av peninginum greið.

**Til § 25.**

Tá Løgtingið í 2011 samtykti Ll. nr. 66 frá 26. mai 2011 (Løgtingsmál nr. 152/2010) var m.a. tilskilað í viðmerkingunum (Kap. 3. Serligar viðmerkingar: Til § 1 nr.2, stk.5) soleiðis:

> Royndarstøðin í Hoyvík (Hoyvíkshagi, sunnari partur, matr.nr. innangarðs 2a og uttangarðs 135) og Royndarstøðin í Kollafirði (Heygsgarður, matr.nr. innangarðs 241a og uttangarðs 318a) hava ávikavist 34 mió. og 4,2 mió. kr. á festikonto. Hetta eru ikki vanlig festir longur. Tað er ætlanin, at landsstýrismaðurin seinni kemur við ætlanum um, hvussu hesin peningur skal nýtast.

Í *álitinum* frá samdari Vinnunevnd, varð tilskilað:

> Upphæddirnar, sum standa á festikonto hjá Royndarstøðini í Hoyvík og Royndarstøðini i Kollafirði, eru ikki fevndar av uppskotinum.
>
> Vinnunevndin skjýtur upp, at helvtin av teimum 34 mió. kr., sum standa á konto hjá *Hoyvíksgarði* verða fluttar á felags festikontuna eftir sama leisti, sum er í uppskotinum. Hin helvtin verður standandi til ymisk almenn gagnlig endamál. Talan kundi verið um varðveiting av húsdjórum av føroyskum uppruna, Koltursætlanin ella aðrar tjóðgarðar og útisøvn.

Nýggja skipanin gevur bæði festarum og óðalsmonnum lættari atgongd til fígging úr grunninum bæði sum stuðul og sum lán enn frammanundan við festikonti og felagspulju.

Upphæddin tá nevnd kr. 34 mió. var kr. 34.132.639 og eftir 2 flytingar er upphæddin 01.jan. 2013 kr. 30.719.375.

Nú verður øll eftirveramdi upphædd nýtt til sonevndu Koltursætlanina við kr. 6 mió. og restupphæddin kr. 24.719.375 til stráfóðurstuðul. Koltursætlanin umfatar eisini føroysk húsdjór, sum nú eisini fáa fastar karmar at virka undir.

**Til § 26.**

Ongin viðmerking

Løgtingsmál nr. xx/2013: Uppskot til løgtingslóg um broyting í skattalógini

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt**

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 7. juni 2012, verða hesar broytingar gjørdar:

**§ 1**

Í § 25 verður í punkt 6) sett inn sum seinasta petti:
"Sama er galdandi fyri Studningslán, sum verða veitt eftir lóg um Búnaðargrunn."

**§ 2.**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Kap. 1. Almennar viðmerkingar.**

Samstundis sum hetta lógaruppskot verður lagt fram, verður lagt fram uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Búnaðargrunn.

Í nevnda lógaruppskoti er heimilað Búnaðargrunninum at veita studningslán. Studningslánini verða veitt kontant og eru tey rentu- og avdráttarfrí og verða avskrivað yvir 15 ár við 1/15 árliga, hvønn 31/12.

Studningur er samb. galdandi skattalóg skattskyldug inntøka og skal inntøkuførast í tí árinum hann verður veittur.

Her er tó talan um "studning***lán***". Í prinsippinum er talan um eitt lán við serligum treytum. Verða treytirnar hildnar(t.e. ognin verður framhaldandi nýttt til tað sum studningurin varð veittur til og ognin verður ikki seld) verður lánið avskrivað árliga við 1/20. Tí kann ein helst siga, at ikki fyrr enn tann einstaka avskrivingin er gjøgnumførd er talan um studning. Studningurin verður so inntøkuførdur fyri tað einstaka árið avskrivað verður.

Broytingin, sum her verður skotin upp, er meinlík regluni í verandi skattalóg § 25 punkt 6, tá tað ræður um studningar av líkum slagi.

**Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

Lógaruppskotið:

- hevur fíggjarligu avleiðingarnar fyri land og kommunur.
- hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.
- hevur fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna.
- hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.
- hevur ongar serligar fíggjarligar, umsitingarligar, ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.
- hevur ongar sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.
- er ikki tengt at millumtjóða sáttmálum.

| | Fyri landið/lands myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Sosialar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

*Til § 1*

Fyri at burturbeina allan iva verður reglan innsett og gevur samstundis móttakaranum frælsi til at avgerða hvussu nógv verður inntøkuført tey einstøku árini.

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður

/Atli Leo
Aðalstjóri

**Uppskot**

**til**

løgtingslóg um broyting í lov nr. 172 frá 18. maj 1937 for Færøerne om haugers styrelse og drift m.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 77 frá 25. mai 2009

Í lov nr. 172 frá 18. maj 1937 for Færøerne om haugers styrelse og drift m.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 77 frá 25. mai 2009, verða hesar broytingar gjørdar:

**§ 1**

Sum nýggj § 37a verður sett soljóðandi:
"Í seinasta lagi 4 vikur eftir, at endurgjaldsmálið er endaliga avgjørt, skal eigarin/festarin av lendinum, sum talan er um, rinda endurgjaldsupphæddina til viðkomandi eigara/festara av bitinum."

**§ 2.**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Almennar viðmerkingar.**
Greinin, sum her verður sett úr gildi, viðvíkur spurninginum um hvar peningurin fyri bit skal gjaldast.
§ 37 a var soljóðandi:

> **§ 37 a.** [3) 4)] Í seinasta lagi 4 vikur eftir, at endurgjaldsmálið er endaliga avgjørt, skal eigarin av lendinum, sum talan er um, rinda endurgjaldsupphæddina til eigaran, sum eigur bitið, í felagshaga til hagastýrið.
> *Stk. 2.* Tá tað snýr seg um landsjørð verður endurgjaldsupphæddin rindað Búnaðargrunninum.
> Haðani verður upphæddin annaðhvørt
> rindað festara heilt ella lutvíst, um tað á festinum verða gjørdar ábøtur til at betra um raksturin,
> ella hagastýrinum, um ábøtur eru gjørdar í felagshaga.

Nevnda lógargrein § 37a, stk. 2, varð innset við Løgtingslóg nr. 77 frá 25.05.2009.jbr. annars Løgtingsmál nr. 158/2008.

Sum støðan er í dag, eru tað festarar, sum vera fyri vanbýti, tá bitsmøguleikarnir á festinum verða skerdir.
Ognarar fáa sjálvandi endurgjaldið útgoldið beinleiðis, soleiðis at teir kunnu keypa stráfóður fyri hetta – um teir ynskja at varðveita skipanina í haganum.
Hjá festarum er støðan ein onnur. Eftir § 37 a, skal endurgjaldsupphæddin inn í Búnaðargrunnin. Festarin kann so søkja um at fáa endurgjaldsupphæddina útgoldna. Búnaðargrunnurin metir síðani um tað á festinum verða gjørdar ábøtur til at betra um raksturin, sum kann heimilað, at teir útgjalda av bitskonto.
Fyri nógvar festarar hevur tað havt ógvisligar avleiðingar.
Eitt dømi kann lýsa støðuna. Vit hava ein felagshaga har óðal eigur 3/5 av markatalinum og festari hevur 2/5.
Vetrarfriðing hevur við sær, at hagin missir 10ha av bøi.Tað svarar til 100.000 m2 og prísurin er samb. Búnaðartovuna kr. 480.000,- Hagastýrið tekur avgerð um at byggja seyðahús, sum kostar somu upphædd.
Ognarparturin fær kr. 288.000,- Hin parturin kr.192.000,- fer í Búnaðargrunnin. Festarin kann so søkja um hesa upphædd. Búnaðargrunnurin sýtir at ganga umsóknini á møti. Festarin verður tá noyddur at gjalda úr egnum lumma.
Slíkt sigur seg sjálvt eigur ikki at finna stað.

Er talan um einbýttan haga hjá festara er støðan eins vánalig.Verður vetrarfriðað so missir festarin rættindi. Skal skipanin varðveitast, má festarin ognað sær fóður aðrastaðni frá. Hví skal kompensatiónin, sum er fyri hesi mistu rættindi ikki koma festaranum beinleiðis til góðar men at Búnaðargrunnurin skal taka avgerð um varandi ábøtur. Tað dugir festarin nógv betri sjálvur at taka avgerð um.
Síðani festibrøv í 2007 gjørdust umsetilig er tað meinigsleyst at krevja at endurgjaldsupphæddin skal nýtast til varandi ábøtur á festi.

Ein trupulleiki, sum nógvar kommunir dragast við, er vetrarfriðing av bygdunum. Eftir verandi lóggávu er tað bert eigarin(festarin) av haganum og eigarin av undirliggjandi bøi, sum kunnu krevja avloysing. Kommunir hava ikki rætt til tess.

Kommunan má sum er ígjøgnum eigara ella festara og biðja teir um at seta í verk vetrarfriðing. Tað hava teir ikki áhuga í, tí teir fáa ikki ágóðan av hesum - peningurin fer óskerdur í Búnaðargrunnin.
Eftir hesum uppskoti fáa festararnir ágóðan beinleiðis. Tá verður tað nógv lættari at samráða seg til rættis.

Í kunngerð nr. 95 frá 23. oktober 2007 um umsiting av landsjørð, sum seinast broytt við kunngerð nr. 129 frá 26. september 2011 er ásett hvat endurgjald er fyri mist bit. Sambært hesi kunngerð er gjaldið 4,80 kr fyri fermeturin fyri dyrkað lendi og 0,70 kr fyri fermeturin fyri hagalendi/ódyrkað lendi.
Hetta eigur at verða broytt soleiðis, at tað er pláss fyri, at tað er festarin ið tekur avgerðina um hvat hann skal hava fyri mista bitið.
Tí verður kunngerðin broytt soleiðis, at festarin kann avtala eina minni upphædd fyri mista bitið. Hann kann hinvegin ikki krevja hægri endurgjald fyri mista bitið enn longu ásett í kunngerðini.

**Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**
Lógaruppskotið:

- hevur ongar fíggjarligu avleiðingarnar fyri land og kommunur.
- hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.
- hevur fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna.
- hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.
- hevur ongar serligar fíggjarligar, umsitingarligar, ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.
- hevur ongar sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.
- er ikki tengt at millumtjóða sáttmálum.

| | Fyri landið/lands myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

Til § 1
Eftir broytingina verður alt endurgjald fyri mist bit at endurgjalda eigara ella festara beinleiðis. Peningur skal sostatt ikki longur inn í Búnaðargrunnin.